## VIÐMERKINGAR

# Javnaðarkósin

**Bill Justinussen,**
*løgtingsmaður fyri Miðflokkin*



Í fjør helt løgmaður røðu fyri teimum homosexuellu í Grasagarði, har hann hálovaði sínum egna tolsemi. Mánamorgunin setti hin javnaðarmaðurin í landsstýrinum, Hans Pauli Strøm, ráðstevnu í Norðurlandahúsinum fyri homosexuel lesandi. Sostatt stendur øllum í landi okkara púra greitt, at javnaðarflokkurin hevur ein almennan politikk, sum vælsignar homosexuellan livihátt. At hesin flokkurin skal vera stjórnarberandi er ein vanlagna fyri land okkara, tí tá landsins leiðarar, teir, sum fólkið skal fylgja og síggja upp til, seta slíka kós fyri fólkið, sigla vit vandasjógv sum tjóð. Sum landsins leiðarar eiga teir at sýna virðing fyri teimum kristnu virðum, sum fólk okkara hámetir. Og tey virðini eru fyrst av øllum ótti (respekt) fyri Guði og Hansara orði. Seta vit Guðs orð til síðis fyri ein næstrakærleika, sum góðtekur, at "hvør ger, sum honum lystir", so er næstrakærleikin ikki annað enn líkasæla fyri næstanum. Lata vit næsta okkara í blindum ganga út av eggini, tí honum lystir tað, so elska vit ikki næstan. Næstrakærleiki er at peika á sannleikan. Og sannleikin um tey homosexuellu er, at tey liva í stríð við náttúruna, so sum Guð, skaparin og upphavið til alt lív í sínum alvísa ráði hevur skapt hana. Á so nógvum økjum gera vit almennar fyriskipanir, sum eru ætlaðar til at hjálpa, har borgarin er farin av kós. Men á hesum øki er øvugt. Heldur enn at hjálpa fara landsins leiðarar út og gera seg upp við sínum tolsemi. Men tolsemi er eitt sera misbrúkt orð. Tolsemi snýr seg um at góðtaka, at onnur hava aðra meining. Tolsemi snýr seg um at tala seg til rættis heldur enn at kríggja seg til rættis. Tolsemi snýr seg ikki um at sleppa ábyrgdini fyri næstanum, tí hann má sjálvur um, hvussu hann livir.

Hans Pauli Strøm sigur, at fólk mugu sjálvi um, hvørjum tey sova saman við heima við hús. Í fyrstu atløgu ljóðar tað sera tolsamt, sera humant. Men er hetta nú rætt. Hvar gongur markið fyri hesi líkasælu landsstýrismansins? Kann ein maður t.d. hava 5 konur, sum vit kenna frá øðrum londum? Og hvussu ætlar Hans Pauli Strøm við sínum tolsemi við lóg at tryggja tí manni og teimum 5 konunum teirra "sjálvsøgdu" rættindi? Skulu tey ikki sjálvi sleppa at avgera, hvussu tey vilja liva? Skylda vit ikki slíkum til ta tíð eina lóggávu, sum tryggjar eftirsitandi hjúnarfeløgum arvarætt? Um kona nr. 3 doyr fyrst, hvør skal so arva hana? Maðurin, hinar 4 konurnar ella bara hennara børn og ikki hini børnini? Og hvat við teimum 20 børnunum? Skulu vit ikki hava serligar "avsláttarskipanir" til barnagarð, skúlar, strandferðslu og annað, tá hesin maðurin við sínum 5 konum kemur til kassa 1 at biðja um hjálp til uppihald? Skal okkara samfelag skrotta allar normar? Skulu vit ongar absoluttar hava? Eru ongir megin"holdningar" galdandi longur? Skal hjúnalagið bara vera ein av mongum samlívsformum at velja ímillum? Hvat er ein familja í verðini hjá Hans Paula? Er tað tveir pápar og 3 ættleidd børn? Ella 1 pápi, 7 mammur og 31 børn? Hvørja kós ynskir Hans Pauli og hansara løgmaður, at okkara samfelag skal halda og hvar eru vit í 2015?

Hesir javnaðarmenn eru ikki bangnir fyri at lata børn vaksa upp við 2 pápum og ongari mammu og øvugt. Men samstundis hava javnaðarmenn í norðurlandahøpi gjørt av at kanna umstøðurnar hjá børnum, sum vaksa upp í "nýreligiøsum" heimum. Og undir teirra "nýreligiøsa" hugtak kemur alt, sum ikki kann kallast etablerað trúarsamfeløg. Eisini hvítusunnusamkomur og líknandi trúarsamkomur skulu undir lupp norðurlendsku sosialdemokratanna. Tí vandi er fyri, at tey verða heilavaskað, verður sagt. Men at geva homosexuellum rætt til at uppala børn, er eitt av fremstu áhugamálum norðurlendsku javnaðarmanna. Onki uppskot er um at kanna uppvakstrar-umstøðurnar hjá hesum børnum. Ongin veit, hvussu hesi børn hava tað og hvørjar kenslur bylgjast í teirra barnahjarta. Soleiðis sær politiski veruleikin út ídag. Ætlanin við miðvíst at bróta niður kristna grundstøðið í samfelag okkara gerst meir og meir sjónlig. Stig fyri stig er javnaðarkósin sett. Eins og í hinum norðanlondunum.

### Takk Gerhard og Jógvan

Gerhard Lognberg er eitt undantak. Hann fylgir tíbetur ikki javnaðarkósini. Hann hevur boðað frá, at hann als ikki hevur álit á sínum landsstýrismanni, og at hann angrar, at hann nakrantíð hevur valt hann til landsstýrismann. Og Jógvan á Lakjuni hevur somuleiðis gjørt sína støðu greiða fyri landsstýrinum. Gott, at vit eiga slíkar menn, sum ikki tiga, og tøkk skulu tit hava fyri tað. Vónandi gera tit tykkara ávirkan galdandi, næstu ferð boð verða eftir einum tolsamum, líkasælum politikkara, sum heldur, at "øll skulu bara gera, sum teimum lystir".

Latið okkum standa saman um at verja okkara land, so vit kunnu tryggja børnum okkara eina bjarta framtíð, har ongin ivi er um, hvørji virði varða.

# Teokrati/demokrati - "genialt"

**Líggjas Olsen**

Eg plagi ikki at skriva lesarabrøv. Men seinasta vikan fekk meg at taka fat í pennin, ella rættari tastaturið. Eg haldi tað sum hendir í politiska orðaskiftinum viðvíkjandi teimum samkyndu er vanæriligt og skomm fyri føroyska samfelagið.

Demokratiið í Føroyum er í vanda. Okkara valdhavarir vilja ikki taka støðu til tey samkyndu, ella eisini hava teir eina sera greiða støðu. Hendan greiða støðan er Bíblian, sum vil vera við, at samkyndleiki er ein synd. Hetta tulka ávísir limir í føroysku samgonguni sum um at vit eiga at forða fólki, ið reint faktiskt eru samkynd, at vera til - at vera seg sjálvi. Man uppfordrar til sjálvútslettan frá ovastu rók í landinum, tí man heldur at vanlagnan er yvir okkum! "Tit eru syndarar, vend við!!"

Vil Føroya fólk stuðla hesum? Nadoyð, hetta minnir ikki sørt um miðøldina. Nær ætla tit at koma eftir okkum miðalhampa syndarum og biða okkum venda við, tí vit eru sgu eisini "á skeivari leið"?? Hvat er tað við hesum samkyndu, sum er so nógv verri? Tey taka hann í reyvina jú, men tað er nú ikki heilt óvanligt millum miðalhampa heteroseksuell í "dagsins Sodomu".

Vita tit hvat? Hesi fólkini hava eisini kenslur (sum ikki bert eru seksuellar). Veruligar kenslur. Tey elska fólk av sama kyni, og vilja (við fríum vilja) sleppa at liva saman við fólki av sama kyni, uttan at okkara "demokratisku" leiðarar skulu koma og kalla hetta synd, sum jú langtsíðani er avtikið í vesternlendskum politikki. At tit váða tykkum at gera hettar við samkynd, er yvir mítt høvd. Halda tit veruliga at samkynd koma í himmalin við at gevast við at elska fólk av sama kyni? Kanska?

Tað er líkamikið um tit halda tey samkyndu vera sjúk. Tit hava ongan rætt til at kalla tey sjúk í politiskum høpi, tí einki er prógvað hesum viðvíkjandi. Og í politikki er man farin frá Gud og djevlinum (uttan í Miðeystri), tí man fann útav at tað var rættari at lata fólk trúgva tað tey vilja, **og lata tey sleppa at liva hareftir.** Minnast tit? Eg helt at tað meir ella minnið var soleiðis í Føroyum, men nú ivist eg stórliga. Skal tykkara "antisamkynd-lata-standa-til-lóg" veruliga páduttast meg (eri ikki homoseksuellur, men kenni nøkur), sjálvt um eg var buddhist? Ella atheist? Tí annars verður "Hann" illur og fer at sáða? Trúgv er persónlig, folkens, staturin heldur seg vekk frá slíkum viðurskiftum og fortelur ongum hvørja seksuella orientering ein eigur at hava. Hetta er uppíblanding av persónligum viðurskiftum, og tað vil eg hvørkin hava Jógvan á Lakjuni, Jenis ella Gerhard at gera fyri meg.

Eg veit væl, at tit hava ein idé um, at Gud vil hava okkum at liva á ein bestemtan hátt. Takið tit í egnan barm, og liv eftir hesum reglum. Tað er ikki rætt at lóggeva ímóti einum minniluta, tí at man sjálvur hevur eina abstrakta, metafysiska sannføring. At tit demonisera tey samkyndu í Føroyum, er eitt tekin um, at tit kanska ikki sjálvir hava eitt so gott forhold til Hann. Trúgv mær, samkynd finna ikki Gud við at tit útihýsa teimum. Slíkt førir til minnilutakenslur og tunglyndi og til rýman av landinum. Tað er kanska júst soleiðis tit vilja hava tey at "finna syndina í sær sjálvum"? Ella? Eg kenni ein, sum vildi gera sjálvmorð, tí hugburðurin í landinum gjørdi at hann kendi seg fremmandagjørdan. Og nú frá ovastu rók, tí man við eini ráðstevnu vil seta ljós á samkyndleika. Stakkalin. Hann fer at vera landinum til undirgangs (sic).

Hví taka tit ikki alkoholið av hyllunum, tá hetta jú er við til so nógvan ólevnað og skaða fyri samfelagið? Bíða nú, har eru inntøkur at heinta. So má synd vera synd. Ongar inntøkur hjá teimum homoseksuellu, tíverri (Nei búðskapurin fer kanska beinleiðis at stagnera, um tey SAMKYNDU verða vird) ...Men har eru stemmur at heinta. Ikki so? Eftir teimum!!!

Hvat í allari víðu verð billa tit tykkum inn?? Gerhard, Jógvan etc..Tit umboða OKKUM, fólkið, og FÒLKIÐ vil ikki hava nakra heksajakstran anno 2005. Antin taka tit tykkum saman og reka demokratiskan, fornuftigan politikk (og fornuft merkir her at brúka høvdið), ella mugu vit reka tykkum niður av rókini (við ikki at stemma uppá tykkum, vælsaktans). Vit hava ivaleyst av synd í samfelagnum sum er, og tað er ein sjúk fatan at halda, at Gud fer at "heysta" um vit vísa næstakærleika til "TEY". "TEY" eru VIT, og VIT vilja hava líkarætt í samfelagnum. Vit vilja hava, at fólk hava tað gott, kenna seg væl her í Føroyum, uttan at Løgtingið soleiðis kallar okkum syndarar. Tað líkist akkurát ongum! Staturin vendir ongum við, tað hava vit kirkjur og samkomur til. Ella hvussu er? Høvdu tykkum dámt best teokrati framum demokrati? Og er tað ikki nærmari einum teokratii, tá tit soleiðis "belæra" okkum um hvat er rætt og hvat er skeivt úfrá Bíbliuni??

Vit eru farin frá at smíða lógir útfrá abstraktum, metafysiskum lógum í einari bók, og tað áttu tit sum politikkarir at vita. Eg øtist, at mín mentamálaráharri og Gerhard Lognberg ditta sær at demonisera samkynd (tað er at demonisera, tá man spáðar vanlagnu fyri samfelagið við akksept av einum minniluta), tá tað júst eru hesi fólk, sum um allan heim í stóran mun eru við til at skapa tað, vit kalla mentan. Tú kanst halda, at hetta er skeivur mentalitetur útfrá Bíbliuni, men brúka nú ikki tína makt uppá slík persónlig viðurskifti, men heldur uppá at skapa eitt vælfungerandi, demokratiskt samfelag, har vit eru frí at vera sum vit eru, eisini við teimum "veikleikum" vit nú einaferð hava. Vit eru ikki ein stór familja í Føroyum longur. Diversitetur er komin fyri at vera, og tit gera so væl at arbeiða soleiðis, at vit øll mega hava tað gott. Eisini í 2015.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.